# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Uppskotið um verjuskyldu ein provokatión

Uppskotið hjá danska fólkaflokkinum um føroyska verjuskyldu er uttan iva ætlað sum ein provokatión. Danski fólkaflokkurin hevur altíð havt ilt av blokkinum og hevur so av og á tveitt slíkar brandar inn í viðurskiftini millum Føroya og Danmark. Løgting og landsstýri eiga uttan víðari at vísa hesum uppskoti aftur. Tað eru nógvar og góðar grundir til at ikki at góðtaka hetta uppskot.

Fyri tað fyrsta er torført at taka uppskotið í álvara, tí uppskotið er sum longu nevnt ein opinber provokatión, hvør skal siga: føroyingar njóta bert rættindi, meðan teir ikki gera sínar skyldur í ríkisfelagsskapinum. Tað er ikki óhugsandi, at nógvir danir, sum ikki kenna viðurskiftini millum bæði londini, fara at taka undir við hesum hugsunarhátti. Til hetta eiga føroyskir myndugleikar at svara, at føroyingar frá gamlari tíð hava havt ávís rættindi í ríkinum. Eini av hesum rættindum vóru júst hetta ikki at hava verjuskyldu. Vit eiga at halda fast um hesi gomlu rættindi. Herumframt eiga føroyingar at vísa á, at føroysk verjuskylda í Danmark er ein so grundleggjandi broyting av galdandi fortreytum fyri ríkisfelagsskapinum, at hetta í sjálvum sær talar ímóti uppskotinum hjá danska fólkaflokkinum.

Spurt kann verða, hví uppskotið kemur júst nú? Hvør er orsøkin til hesa margháttligu timing? Danski fólkaflokkurin hevur frá fyrsta degi havt ilt av ríkisfelagskapinum. Í løtuni er rættiliga friðarligt millum londini, og tað tykist, sum flokkurin kundi havt áhuga í einum ávísum rumbli. Formaðurin í størsta andstøðuflokkinum hevur lagt ábyrgdina av uppskoti danska fólkafloksins á løgtingið, sum hann sigur hava samtykt mál, ið rudda vegin fyri føroyskari verjuskyldu. Løgmaður hevur sum vera man víst hesum aftur. Samantikið má sigast, at tað er torført at taka uppskotið fyri fult. Hinvegin er uppskotið væl egnað at grugga tey rættiliga góðu viðurskiftini, sum í løtuni valda millum tjóðirnar báðar. Tískil má løgmaður taka alt hetta í álvara, bæði danska fólkaflokkin og føroyska tjóðveldisflokkin.

**Sosialurin**

## Aftur í gráum kálvsskinni

HØGNI HOYDAL



**Danskir politikarar krevja nú herskyldu fyri føroyingar og siga føroyingar vera danir. Hetta er ein beinleiðis avleiðing av, at Løgtingið samtykti lógir um Føroyar sum danskan landslut, og at ST fekk fráboðan um, at vit eru undirskipaður partur av danska eindarríkinum. “Tit hava sjálv valt tað, og nú mugu tit liva upp til tykkara skyldur”, eru afturvendandi boðini á Fólkatingi**

Ávaringarnar og mótmælini trutu ikki, tá løgmaður í 2005 í øðum verkum legði uppskot um danskar lógir fyri fyri tingið, ið staðfestu Føroyar sum ein samrunnan og undirskipaðan part av Danmark. Hetta vóru lógir, ið danska stjórnin síðani 1998 hevði roynt at fingið ígjøgnum til tess at steðga fullveldisgongdini og parkera Føroyar sum “moderniserað heimastýri” í danska eindarríkinum.

Í viðmerkingunum til donsku lógirnar var á tíggjutals síðum sligið rimmarfast, at føroyingar vóru ikki til sum tjóð, men vóru ein partur av donsku tjóðini, og at føroyskir myndugleikar bert hava “fingið” ávísar heimildir frá donskum ríkismyndugleikum at pjøssast við síni lokalu viðurskifti.

Longu í 2004 hevði løgmaður eisini boygt seg fyri trýsti frá donskum myndugleikum í hernaðarmálum. Løgtingið hevði í eini røða av samtyktum síðani seinna veraldarbardaga tvíhildið um, at føroyingar ikki hava tikið undir við hernaðarvirksemi av nøkrum slag, og at Føroyar ikki skulu nýtast til nakað hernaðarligt endamál uttan so, at Løgtingið hevur gjørt tað av.

Hóast støðugt trýst frá donsku stjórnini, hevði Løgtingið staðið samt og hildið fast um ikki at góðtaka, at Føroyar vóru partur av donksum hernaðarmálum. Men eitt tað fyrsta nýggja samgongan gjørdi, var at leggja uppskot fram um nýggja hernaðarsamtykt, har alt vald varð latið upp í hendurnar á donskum myndugleikum, meðan føroyskir myndugleikar bert skulu kunnast og hoyrast, áðrenn avgerðirnar verða tiknar – t.e. at Løgtingið fær støðu sum ein almennur stovnur ella ein kommuna undirskipað einum øðrum valdi.

Eftir allar hesar óviðgjørdu avgerðir, boðaði danska stjórnin ST frá, at føroyingar sjálvir hava valt at gerast partur av danska eindarríkinum. Tjóðveldisflokkurin legði beinanvegin uppskot fyri tingið um at mótmæla beinleiðis hjá ST. Uppskotið varð felt, men Fólkaflokkurin boðaði fyri einum ári síðani frá, at Anfinn Kallsberg hevði “syrgt fyri”, at danska stjórnin beinanvegin fór at senda nakrar føroyskar viðmerkingar (ið ikki eru stórt frægari) til ST. Hetta hevur higartil víst seg at vera bluff .

Henda amatørkend gongd, ið stríðir móti øllum fólkaræðisligum grundreglum, hevur síðani givið at bíta millum danskar politikarar og í donsku stjórnini.

Uttan mun til, hvat mál verður reist millum danskar politikarar í dag á Fólkatingi, har víst verður til føroyskt fullveldisstríð, so verður tað beinavegin afturvíst og sligið upp í glens vísandi til, at Føroyar eru samrunnin partur av danska ríkinum og at Løgtingið hevur sjálvt samtykt tað.

Millum stjórnarpolitikarar og embætisfólk verður flent í kíki at, hvussu lætt tað eydnaðist at fáa enntá fyrrverandi løgmannin í fullveldissamgonguni at bakka fyri øllum teimum krøvum, ið longu vórðu sett fram í 1998 frá Nyrup-stjórnini.

Í seinastuni eru tvey ítøkilig dømi um hesa gongd: Danski Fólkaflokkurin krevur herskyldu fyri føroyingar vísandi til, at vit “eru partar av danska ríkinum”. Og hvør skal siga tey ring fyri tað, tá tað eru boðini, ið Løgtingið hevur sent til Danmarkar?

Og ein fyrrverandi ráðharri í Radikala Vinstraflokkinum, sigur í samrøðu við Dimmalætting: “Vit eru danskarar, tit eru danskarar, og tí er tað okkara skylda at hjálpa”.

Hetta eru greflig dømi um ta kollvelting, ið er farin fram millum danskar politikarar, har allar royndir hjá fullveldisfólki at mótmæla, verða kveistraðar til viks sum umboðandi “ein minniluta” mótvegis samtyktunum hjá samgonguni.

Tí eiga samgongan og løgmaður nú at ásanna sína ábyrgd fyri hesi ófrættakendu gongd, ganga í seg sjálvan og gera greitt, at føroyska fólkið ongantíð hevur tikið undir við hesum skeivu avgerðum løgtingsins.

## Hvør kann royta Bjarna Djurholm undir armin?

HEÐIN POULSEN



Nú hendi tað aftur. Bjarni Djurholm vísir greitt, at hann ikki ynskir at fáa flogvøllin í Vágum útbygdan. Hann skyldar upp á flogskiparar og sigur, at teir ynskja annan flogvøll.

Er hatta ikki tað, sum kallast fyri manipulatión? Sjálvur spurdi eg beinanvegin nakrar flogskiparar um teirra útsøgnir. Er tað so, at flogskiparar halda, at vit skulu hava annan flogvøll, so er tað ein staðfesting. Men at leggja teimum tað í munnin fyri at fáa fyrimun av egnum áhugamálum er at niðurgera teir. Men teir skulu hava tøkk uppiborna, at teir hava stigið fram í miðlunum og sagt, at Bjarni Djurholm blandar tingini saman.

Teir vilja ikki hava annan flogvøll. Íhvørtfall ikki enn. Tað er útbygging av verandi flogvølli, sum er neygðugt at fáa gjørda beinavegin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.